# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Einki fæst fyri einki

Tað var William Heinesen sum segði, at Føroyar eru eitt sandkorn í Atlantshavi – men samstundis heimsins nalvi. Ein skaldslig mynd av alski okkara til heimlandið. Men neyvan er tað soleiðis, at alheimurin kennir okkum. Tá vit nevna alheimin ella umheimin, tá hugsa vit um týdningarmestu samstarvsfelagar okkara, ES og EFTA-londini.

Eftir valstríðið við nógvum tosi um alheimsgerð er tíðin komin til sjálvrannsakan. Fyri at skera marknaðarviðurskiftini út í papp kunnu vit siga, at tveir vegir eru nevndir: Annar sær EFTA leiðina sum eina blindgøtu, ein felagsskap, sum hoyrir fortíðini til, meðan hin parturin heldur, at hetta er leiðin til ein EBS-limaskap við atgongd til handilssáttmálar við lond uttan fyri Evropa, sum EFTA hevur sáttmálar við.

Annar parturin sá eina atkvøðugreiðslu um ES-limaskap sum einastu gongdu leiðina um vit skulu tryggja framtíðar vælferð, meðan hin parturin avnoktar hendan møguleikan vísandi til, at hetta bert kann gerast, um vit eru eitt sjálvstøðugt land. Eisini setur hesin parturin spurnartekin við, um hetta ikki fer at kosta okkum ræðisrættin á fiskigrunnunum. Hetta síðsta hava køn fólk sátt iva um. Sagt verður, at vit longu nú lata stóran part av okkara heimliga tilfeingi í býti við fiskirættindi aðrastaðni. Eisini verður ført fram, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES ikki er statiskur.

Tíðin er nú búgvin til, at vit taka okkum saman og velja, hvørja leið vit ganga. At gera alt hálvhjartað og ríða á tveimum hestum førir ikki til nakað. Hetta man eisin vera orsøkin til, at vit ongantíð hava gjørt eitt fullfíggjað heildarupplegg til, hvussu vit skulu fara fram, og hvar vit veruliga skulu satsa.

Hetta er støðan hóast bæði Bláa og Reyða álitið, har grundleggjandi arbeiðið varð gjørt til at fara undir víðfevnandi samráðingar við partarnar í góðum samstarvi við danir.

Vit kunnu ikki bara halda fram sum er, tí tað hevur ikki givið nakað frambrot á hædd við tað, sum vinir og grannar og kapingarneytar hava megnað.

Bæði mótvegis EFTA og ES hava vit valt ein leist, ið setir okkum sum biddaran, ið altíð er til reiðar at taka til takkar við molunum frá ríkmannaborðinum heldur enn at gera sær greitt, at einki veruligt fæst fyri einki.

Vit skulu bara gera okkum greitt, hvat mál okkara er – og ikki minst, hvat vit eru til reiðar at lata. Tí í veruleikanum fæst einki fyri einki. Men viðhvørt fæst nógv meira, enn vit lata – um telvað verður rætt.

**Sosialurin**

## At síggja við hjartanum

***Tíðindaskriv***

**Kennir tú onkran við sálarsjúku? Stríðist ein av tínum nærmastu við sálartrupulleikar?**

Tað kann vera maður, dóttir, systir, mammubeiggi, svágur, starvsfelagi ella granni tín. Tá tað rakar í tínum nærumhvørvi – hvat gert tú tá?

Leygardagin 1. mars varpa Sinnisbati og Psykiatriski Depilin ljós á støðuna hjá teimum avvarðandi. Úr ymiskum sjónarhornum verður støðan hjá teimum við sálartrupulleikum og teirra avvarðandi lýst.

Skráin fyri evnisdagin er fjølbroytt og nomið verður við nógv ymisk viðurskifti, sum knýta seg at tí, at verða avvarðandi hjá sálarsjúkum

Á evnisdegnum fáa vit m.a. vitjan úr Noreg og Danmark.

**Andrea Fisker**, sálarfrøðingur fer á evnisdegnum, at seta orð á alt tað vit ikki tosa um viðv. sálarsjúku. Um fyrilesturin sigur Andrea: *"Tað er eitt stórt tabu knýtt at sálarsjúku. At seta orð á hetta tabu, kann verða við til at opna okkara eygu og bjóða okkara vanahugsan av. Mínar royndir við at undirvísa sálarsjúkum og teirra avvarðandi siga mær, at tað ofta setur nógvar tankar í gongd og veksur um tolsemi, tá borðreitt verður við øðrvísi spurningum, sum kunnu geva øðrvísi svar og eina øðrvísi áskoðan á sálarsjúku".*

**Esther Risstubben** tekur lut á evnisdegnum við einum fyrilestri um: **Hvussu skapa vit vón og lívsmátt innan sálarfrøðiliga viðgerð, har bæði tann sálarsjúki og tey avvarðandi eru ein virkin partur**. Esther hevur drúgvar royndir innan avvarðandi-arbeiði, hon var m.a. verkætlanarleiðari, tá ein virkisæltan fyri avvarðandi varð gjørd í Noreg. Hon fer á evnisdegnum at greiða frá, hvat er umráðandi at hava í huga, tá tað kemur til avvarðandi hjá sálarsjúkum.

Á evnisdegnum fer eisini **Hallur Gilstón Thorsteinsson**, cand.mag. í sálarfrøði og heimspeki, at hava fyrilesur við heitinum **"Tá børn eru avvarðandi"**. Hallur fer í sínum fyrilestri at vísa á, at tað at vaksa upp í eini familju, har antin annað ella kanska bæði foreldur hava sálarsjúku, kann hava stóra ávirkan á børnini. Ofta verða hesi børn gloymd - ella slettis ikki sædd - tá hjálp skal veitast familjuni; tað er jú mamman ella pápin, ið eru vorðin sjúk - ikki barnið. Hetta kan hava álvarsligar fylgjur fyri hesi børn. Fyrilesturin snýr seg um, hvussu sálarsjúka í familjuni ávirkar barnið, hvørji eykenni gerast sjónlig, og hvussu vit stuðla børnunum á besta hátt.

Á evnisdegnum taka eisini hesi lut:

**Annlis Bjarkhamar, samskipari: At síggja við hjartanum.**
Sum avvarðandi eru vit kensluliga knýtt at tí sálarsjúka. Hvussu ávirkar hetta okkum? Hvat hava vit, sum avarðandi, tørv á?

**Jógvan Fríðriksson, bispur: Vónin, eitt ískoyti til trivnað ella trivnaður?**
Tann ítøkiligi veruleikin er ikki alt avgerandi. Fatanin, - hugburðurin myndar lívið. Vónin er sum einar opnar dyr, ein møguleiki. Dagurin í dag er framtíðin, tá vónin leiðir ávegis.

**Tormóður Stórá, depilsleiðari: Nærverandi avvarðandi.**
Hvussu kunnu tey avvarðandi gerast ein natúrligur partur av viðgerðini hjá tí sálarsjúka?

**Lena og Niclas seta sín dám á dagin við tónleiki.**

Evnisdagurin er bæði fyri tey avvarðandi, tey við sálartrupulleikum og tey, sum starvast innan øki, har tey koma í samband við fólk við sálartrupulleikum og/ella teirra avvarðandi.

**Stað:** Norðurlandahúsið
**Tíð:** Leygardagin 1. Mars kl. 9.00-16.00
**Kostnaður:** 400 kr (við í prísinum er eisini kaffi og ein máltíð á miðdegi)

Til ber at tekna seg til evnisdagin við telduposti: sinn@email.fo ella á tlf: 50 76 32.

Seinasta freist at tekna seg til evnisdagin er hósdagin 21. Februar

Evnisdagurin er partur av eini størri verkætlan, sum snýr seg um at betra um umstøður og tilboð til avvarðandi hjá fólki við sálartrupulleikum. Les meira um verkætlanina á www.sinnisbata.fo

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.